
SOLEIÐIS ARBEIÐA TEY
Vitanarfróðu
1 Bumshamar
1
2
HVAT UNDRAR TYKKUM?
HVÍ ER TAD SÓ?
3
LEGGIÐ EINA ÆTLAN
4
SAVNIÐ UPPLÝSINGAR
5
HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL
6
SIGIÐ ØÐRUM FRÁ
HVAT SKULU VIT FARA AT KANNA?
granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

STUTTLIG & KVEIKJANDI

læruleið

FYRI SKÚLAFLOKKAR

Kanningarhátturin hjá teimum vitanarfróðu leggur upp til, at næmingarnir undrast, kanna, spyrja, granska, forvitnast og fortelja um eitt evni, sum tey sjálvi velja.

Leisturin hevur **6 ymisk stig**, har børnini sum tað allarfyrsta velja sær eitt gott og forvitnisligt evni, gjarna tvørfakliga, sum tey ynskja at kanna nærri. Hetta kunnu tey gera sum flokkur ella í smærri bólkum.

1. Hvat undrar tykkum?
2. Hví er tað so?
3. Leggið eina ætlan.
4. Savnið upplýsingar.
5. Hetta eru vit komin fram til.
6. Sigið øðrum frá!

ÁRLIG KAPPING

Um tit hava hug, kunnu tit eisini luttaka í kappingini um at gerast "Ársins Vitanarfróðu". Tá má arbeiðið savnast í eina frágreiðing, sum skal sendast til Granskingarráðið. Hetta er serliga ætlað 4.-7. floks næmingum, men onnur kunnu eisini vera við.

Arbeiðast kann alt skúlaárið. Til dømis kann arbeiðast í oktober og sendast inn í mai.

Freistin fyri luttøku er fyrst í mai á hvørjum ári.

Solciðis gera tit cina frágreiðing

Finnið skjalið til frágreiðingina, sum greiðir frá mannagongdini og arbeiðsháttinum á:

gransking.fo/vitanarfrodu

Lýsið tykkara spurdóm og arbeiðið. Minnist til at lærarin kann hjálpa og leggja lag á, men næmingarnir mugu sjálvir eiga frágreiðingina. Setið endiliga myndir inn í frágreiðingina, sum vísa, hvussu tit hava arbeitt, og at tit hava havt tað stuttligt.

Tað er einki beinleiðis mark fyri, hvussu long frágreiðingin kann vera, og hvussu nógva tíð tit seta av til kanningararbeiðið. Tit avgera púra sjálvi.

PREI

Kanningarhátturin hjá teimum Vitanarfróðu

kann nýtast í øllum lærugreinum

hóskar seg sera væl til tvørfakligt samstarv

hóskar seg sera væl til evnisarbeiði

kann brúkast, tá tit hava tíð og hug

kann brúkast til kapping ella bara til stuttleika

er eitt stuttligt íkast til vanligu undirvísingina og ger læring til eitt spæl

Kanningarhátturin er eisini at finna í lærubókini "Gaia 4", s. 12 og 13

Smærri skúlar við fáum næmingum kunnu lata næmingar arbeiða einsæris ella tvørtur um flokkar

Á gransking.fo/vitanarfrodu finna tit ymiskt tilfar til íblástur og venjing



1. Hvat undrar tykkum?

Tað ber til at undrast á alt møguligt. Veljið ein spurning, sum tit kunnu brúka til at gera kanningar við. Nú hava tit ein spurdóm.

2. Hví er tað so?

Hvat halda tit, at svarið er upp á tykkara spurdóm? Skrivið nøkur uppskot til møguligar frágreiðingar. Slík uppskot verða nevnd hypotesur.

3. Leggið eina ætlan

Leggið til rættis, hvørjar kanningar tit vilja gera fyri at royna, um hypotesurnar passa ella ikki. Roynið gjarna fleiri kanningar fyri at fáa upplýsingar. Tit kunnu til dømis eygleiða, gera samrøður ella gera egnar royndir.

4. Savnið upplýsingar

Savnið saman upplýsingar, sum hava samband við hypotesur tykkara. Bæði slíkar, sum benda á, at hypotesurnar passa, og tær, sum benda á tað øvuta. Minnist til at skjalprógva tað, sum tit gera, ávegis.

5. Hetta eru vit komin fram til

Takið samanum hvørji úrslit, tit eru komin fram til. Hvørjar hypotesur passa, og hvørjar passa ikki. Hvussu kunnu tit nú svara spurdóminum, sum tit byrjaðu við?

6. Sigið øðrum frá

Skrivið eina frágreiðing, sum vísir, hvat tit hava gjørt, og hvørji úrslit, tit eru komin fram til. Tað er týdningarmikið, at granskarar siga øðrum frá tí, teir eru komnir fram til.

NÁM
granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS
STROK